Munnligur fyrispurningur
eftir § 52 í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen landsstýrismaður í heilsumálum
,
Evni: Langar bíðitíðir í barna- og ungdómspsykiatriini

Spurningar:

1. Hvussu langar eru bíðitíðirnar í barna- og ungdómspsykiatriini ?
2. Hvussu nógv børn og ung eru á bíðilista ?
3. Hvussu nógv børn verða útgreinað um vikuna ?
4. Hvussu er tørvurin á innleggingum í barna- og ungdómspsykiatriini ?
5. Hvat verður ítøkiliga gjørt fyri at samskipa betur við eitt nú Sernám og Gigni ?

Viðmerkingar:
Tíverri eru bíðitíðirnar í barna- og ungdómspsykiatriini langar. Í heyst svaraði landsstýrismaðurin, at bíðitíðin var 16-17 mánaðir, og at 196 børn og ung vóru á bíðilista. Hetta er sera ørkymlandi og ein stórur vøkstur í bíðlistanum.

Tað er sera álvarsamt, at bíðitíðin er so long. Sálarligar líðingar og trupulleikar í barna- og ungdómsárunum, sum ikki verða viðgjørd tíðliga, økja um vandan fyri varandi sjúku og trupulleikum. Hetta kann hava ávirkan á lívsgóðskuna bæði í barna- og ungdómsárunum eins og á alla lívsleiðina.
Skjót hjálp er góð hjálp. Tað ræður um at fáa nøktandi hjálp so tíðliga sum gjørligt.

Tørvurin á innleggingarplássum hjá børnum og ungum varierar. Barna- og ungdómspsykiatriska dagdeildin (sum hevur møguleika fyri innlegging) hevur nú hálvt triðja ár á baki. Tí er áhugavert at vita, hvørjar royndir man hevur gjørt sær, og um innleggingartørvurin er nøktaður við dagdeildini.

Tað hevur verið víst á tvørrandi samstarv og samskipan sum part av longu bíðitíðini. Tí er eisini týdningarmikið at fáa greiðu á, hvat ítøkiliga verður gjørt á tí økinum, so børn og ung ikki líða undir tí.

Á Løgtingi, 18. februar 2022

Sirið Stenberg